## VIÐMERKINGAR

# Ein betri Bussleið

**Poula Apol**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*



Nú hevur verið skrivað fyrr í bløðunum um Bussleiðina, men tað ger einki um nakrar viðmerkingar koma afturat. Leið 2 og 3 samarbeiða væl og bíða eftir hvørji aðrari, men leið 1 koyrir solo og hevur ongan góðan, hevur altíð knappa tíð og kann ikki halda minut tíðina.

Eg kann minnast tá Bussleiðin byrjaði at koyra, tá koyrdi leið 1 úr »Steinatúni« niðan í Gundadal 20 og 50 min. Tað passaði væl, tí so varð bussurin í Tróndargøtu ca. 00 ella 30 so man kundi sleppa víðari, tá hevði man eisini møguleika at fara í kirkju ella kristiligar fundir, men sum nú er, ber slettis ikki til við bussi, og tað sama er um kvøldarnar, um man skal til aðrar fundir, tí man blívur 15-20 min. ov seinur skal ein nýta bussin, tað hevði eisini verið gott um Bussleiðin koyrdi 50 min. úr Steinatúni sunnu- og halgidagar, og helst til kl. 20 ella seinri.

Tað haldi eg býráðið skyldar sínum borgarum, sum eru eldri og tí ikki hava møguleikan at hava egnan bil. Sum nú er sær tað út sum bussurin koyrir undan fólki ístaðinfyri at flyta fólk.

# Stutt afturlit

**Sigurð S. Simonsen**
*valevni á lista B*



Góðu fuglfirðingar!

Sum vit øll minnast, so valdu allir 4 listarnir ið stillaðu upp til seinasta kommunuval, at arbeiða saman tey komandi 4 árini. Tó eydnaðist ikki at fáa øll á lista E við í samarbeiðið, orsaka av innanhýsis trupulleikum í lista E.

Tveir av fýra limum av hesum lista vóru sostatt ikki við í nevndararbeiðinum og var tað stórt spell.

Undirritaði var valdur sum býráðsformaður við 7 av 9 atkvøðum og fekk harvið heiti sum borgarstjóri eftir nýggju kommunustýrislógini, ið kom í gildi 1. januar 2001.

Um býráðið og býráðsarbeiðið er stutt at siga, at tað hevur verðið einn góður dámur (atmosfera) og gott arbeiðslag hesa setuna. Arbeiðið úti í nevndunum hevur verði dygdargott og hevur hetta fingið býráðsfundirnar at gingið lættari.

Her er hóskandi at nevna, at Fuglafjarðar kommuna hevur 7 fólk í fyrisitingini, umframt borgarstjóran. Hesi fólkini hava øll drúgvar royndir og eru sera skikkaði, hvør á sínum øki.

Mangan hava hesi fólkini verði góð í ráðum, eisini hjá fólki og fyrisitingum uttan fyri bøgarðarnar.

Búskaparliga hevur kommunan, eins og landið alt, ligið á einum jøvnum høgum støði seinastu 4 árini.

Uppgongdin sum byrjaði í 1997 flataði mest sum út í 2000 og hevur verið støðug líka til nú.

Nú vit eru komin út í endan av oktober 2004 og hendan setan nærkast endanum, kunnu vit bert staðfesta at búskaparstøði hómast at lækka.

Um framtíðarútlitini skal eg ikki røða um her, men í aðrari grein.

Hvussu megnaði so hetta býráðið at stýra. Orðatakið sigur jú, at tað skullu breiðar herðar til at bera góðar tíðir. Í hesum meinast við, at tað ikki er minni krevjandi at sita við ábyrgd í góðum tíðum.

Frá byrjan av vóru vit í býráðnum samdir um at føra ein breiðan politik, soleiðis at skilja, at einki øki skuldi detta niðurímillum. Nógv hevði ligið á láni í teim ringu tíðunum og hildu vit tað vera nátturligt at taka hond í hetta í góðum tíðum.

Úrslitið síggja vit í dag. Tað er ikki tað øki, vit ikki hava verði inni á við meir ella minni játtanum.

Áhugavert hevði verði at fari inn á hvørt øki sær og greina tað út í smálutir, men er hetta ikki rætta høvi til tað (annars eru roknskapirnir bornir út til hvørt hús í kommununi á hvørjum ári).

Ùtreiðsluhagtølini eru deild upp í 11 høvusøkir og fyri at stytta um greinina, verður víst samlaða nýtslan á hvørjum øki, fyri tey seinastu 4 árini.

Av hesum kan ein so síggja hvørjar raðfestingarnar hava verið.

| **Útreiðslur vístar í mió. Kr.** | **2001-2004** |
|---|---|
| Fyrisiting | 19,2 |
| Havnir | 20,0 |
| Renovatión/byggibúning | 10,5 |
| Teknisk mál | 29,2 |
| Skúlamál | 16,2 |
| Mentan og frítíð | 13,9 |
| Barnaansing | 28,9 |
| Social- og heilsumál | 9,9 |
| Rentur | 7,8 |
| Íløgur og grunnar * | 39,1 |
| Lánsgjøld | 18,5 |
| **Tilsamans** | **213,3** |
| **Inntøkur** | |
| Skattur | 159,1 |
| Havnir | 23,6 |
| Aðrar inntøkur/fígging ** | 30,7 |
| **Tilsamans** | **213,3** |

*) størstu postar eru skúlin (16 mió.), havnalagið (14 mió.) og útstýkking (5,5 mió)

**) størstu inntøkur eru foreldragjøld, næmingagjøld (gøtu og leirvíksbørn) og bústovnagjald (Vesturstova)

Samanumtikið kann sigast, at Fuglafjarðar kommuna hevur verið útbýgd nógv seinastu árini, men lutfallsliga nógv tey sístu 4 árini.

Hvussu sær so út fíggjarliga? Her verður ofta svara við at seta nettoskuld uppímóti einari álíkning.

Sum víst í tølunum niðanfyri (góðkend roknskapartøl), so er nettoskuldin hjá Fuglafjarðar kommunu nógv lækka seinastu árini.

| Nettoskuld | | | |
|---|---|---|---|
| 2003 | 2002 | 2001 | 2000 |
| 8.140.877 | 13.309.799 | 16.674.740 | 20.645.718 |

Nettoskuldin pr. 31.12.2003 var uml. 8 mió.

Tó er nettoskuldin pr. 20.10.2004 økt til uml. 12 mió. Hetta kemst av, at avgjørt var at frammskunda skúlabyggingina og bleiv hetta fíggja við lántøku.

12 mió. svara til minni enn eina kvart álíkning.

Hvussu langt aftur í tíðina ein skal leita eftir, at Fuglafjarðar kommuna bara skyldaði eina kvarta álíkning veit eg ikki, men tað er so ikki komið fyri í nýggjari tíð.

Tí vil eg takka núsitandi býráðnum fyri, at "herðarnir vóru nóg breiðir til at bera góðar tíðir".

# Langtíðarætlanir - fíggjarætlanin

**Rasmus A. Joensen**
*valevni hjá Sambandsflokkinum í Tórshavnar kommunu*



Fyritreytin undir øllum virksemi í kommununi, bæði so og so, verður tó altíð fíggjarorkan, tí ikki ber til at hava kommununa gangandi, við ongum pengum.

Fíggjarorkan hjá kommununi er tann skattur, sum verður innkravdur frá borgarunum og fyritøkum og tey gjøld, ið fyritøkur og einstaklingar gjalda fyri ávísar tænastur.

Tað er skyldan og ábyrgdin hjá býráðnum, sum er býráðslimirnir, at gera fíggjarætlan fyri komandi árið, og álíka skatt samsvarandi hesum.

Fíggjarætlanin skal byggja á tørvin hjá kommununi og orkuna hjá borgarunum, og skal tillagast hesi bæði.

Í fíggjarmálum er umráðandi eisini at hyggja langt fram í tíðina - at leggja langtíðarfíggjarætlanir.

Vakin og varin í fíggjarpolitikki.

Sí eisini www.samband.fo

# Rennibreytin er avgreidd!

**Heðin Mortensen**
*býráðslimur*



Havi undir valstríðnum lagt til merkis, at fleiri hava lovað, at nú skal ein rennibreyt koma í høvuðsstaðnum, eftir at bíðað hevur verið eftir henni í áravís. Men óneyðugt er at lova tað, tí sum formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar býráð kann eg upplýsa, at rennibreytin longu er samtykt og peningur játtaður.

Tilsamans fýra milliónir krónur eru settar á bók, oyramerktar til júst rennibreyt við tilhoyri, og ein skipanarætlan fyri øki til frælsan ítrótt er longu gjørd. Hetta øki skal liggja á Hálsi, og fer tað fyrst og fremst at fevna um eina rennibreyt við átta geirum. Harumframt verður fótbóltsvøllur í miðjuni, og eisini er øki lagt av til parkering og møguliga bygging til virksemi á staðnum.

Kommunan eigur longu øki til hesa lidnu ætlan, og bert skal fáast til vega eitt lítið øki aftrat, so verður farið í gongd við arbeiðið næsta ár. Samráðingar um írestandi økið eru í gongd, og so skjótt sum tær eru avgreiddar, verður spakin settur í!

Hetta fer langt um leingi at geva frælsum ítrótti teir karmar, bíðað hevur verið eftir í so mong ár nú. Tá tað ikki bar til at fáa skapt hesar umstøður kring Tórsvøll, mátti onnur loysn finnast, og tað er nú gjørt.

Tí er ikki neyðugt at lova nakra rennibreyt ella nakað øki til frælsan ítrótt, tí hetta er longu skjalfest og játtað, so arbeiðið verður sett í verk skjótast gjørligt.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Hildibjart Johansen, Tórshavn:

# Seks mánaðir vórðu til 44 ár

**Hósdagin 28. oktober var móttøka á Hotel Hafnia í samband við at Hildibjart Johansen, stjóri á Lønjavningarstovuni, gavst vegna aldur tann 1. november 2004 eftir at hava arbeitt 44 ár á stovninum**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Frá Fiskimálaráðnum fekk Hildibjart ein málning av listamanninum Eyðuni av Reyni*

Umleið 100 fólk stukku inn á gólvið hendan dagin. 28. oktober var samstundis 67 ára føðingardagurin hjá Hildibjarti.

Hann fekk nógvar gávur, og tey sum hildu røðu vóru: Óli Jacobsen, frá Føroya Fiskimannafelag, Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Hendrik Old, fyrrverandi formaður í Lønjavningargrunninum, Jákup Sólstein, frá Føroya Reiðarafelag, og Asbjørn Djurhuus, stjóri.

Hildibjart er strandingur. Sum ungur fór hann til skips, hann royndi seg við línu og við silda- og toskagørnum. Hann sigldi frá 1953-55.

Í 1956 fór hann til Keypmannahavnar, har hann fekk sær handilsútbúgving.

1. november 1958 fekk hann starv sum skrivstovumaður á Skála Skipasmiðju, har var hann til januar 1960.

Í 1960 søkti Lønjavn-ingargrunnur Skipsfiskimanna í Havn eftir fólki til skrivstovuna. Hildibjart søkti starvið og fekk tað. Tá hann byrjaði 27. mai 1960, fekk hann at vita, at hann kundi rokna við, at starvið bert vardi í seks mánaðir, men tað bleiv til yvir 44 ár.

Tá Hildibjart byrjaði, var Tórur A. Dalsgaard stjóri. Skrivstovan var í niðaru hædd í heimi hansara í J. Broncksgøtu 31, og fimm fólk vóru í starvi.

Síðan 1973 hevur Hildibjart verið stjóri á stovninum, sum í dag eitur Lønjavningarstovan og heldur til Yviri við Strond.

Foreldrini hjá Hildibjarti vóru: Mia, f. Johannesen, ættað av Stykkinum, og Hans Petur Johansen, av Strondum.

Hildibjart er giftur við Herborg, f. Danielsen, ættað úr Mykinesi. Tey eiga fýra børn: Marna og Jón, sum búgva í Hoyvík, Dánjal Petur, sum býr í Viborg, og Kári, sum býr í Havn. Barnabørnini eru 9 í tali.

Tað er ikki bert Hildibjart, sum hevur verið leingi á sama arbeiðsplássi, tí konan, Herborg, arbeiddi í 32 ár á Tjaldurs Apotekið í Havn. Hon byrjaði í 1957 og gavst í 2003. Hon var burturfrá í nøkur ár.

Nú Hildibjart er farin frá, fær hann betur stundir til síni frítíðarítriv. Honum dámar væl at fiska, og hesa tíðina á árinum at skjóta harur, so hevur hann eisini jørð í Mykinesi.



*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, handar Hildibjarti gávuna frá Fiskimálaráðnum*



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, og Hildibjart Johansen*



*Hildibjart og konan, Herborg, hyggja eftir gávum*



*Óli Jacobsen kom við gávu fra Føroya Fiskimannafelag*



*Ólavur Jákup Kristoffersen, advokatur, versonur Hilbibjart, og Hallgir W. Poulsen, advokatur, heilsa upp á Hildibjart*

### 70 ára føðingardagur

Í dag, 4. november, verður Harry Poulsen, Sandavági, 70 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 6. november frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Dagurin

**4. november. Otto.** Ivingarsamt er, hvør hesin Otto er, men líkt er til, at sipað verður til biskupin Otto úr Bamberg, sum doyði í 1139.

Navnið er týskt og merkir *ríkidømi*.